# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ein viti á vinstravongi

Við deyða Edward Kennedys er ein viti á amerikanska politiska vinstravonginum slóknaður. Hetta skal ikki skiljast sum, at Edward Kenneydy var ein víðgongdur vinstrahallur í okkara merking, men í amerikanskum politiskum høpi var hann við sínum liberalu og humanistisku sjónarmiðjum oddamaðurin á vinstravonginum í Senatinum, har hann hevði verið limur í meira enn 45 ár.

Edward Kennedy royndi at gerast forsetavalevni, men henda roynd miseydnaðist, tá ið demokratiski flokkurin valdi Jimmy Carter fram um Ted, sum hann vanliga varð róptur. Tá vónin um at gerast forsetavalevni var brostin, legði Ted Kennedy alla sína orku í at fremja síni liberalu sjónarmið í senatinum. Hann stríddist fyri betri sosialum korum hjá børnum og teimum fátøku. Hann var ímóti álopinum á Irak, og eftirtíðin kom at vísa, at hann fekk rætt í sínum spádomum, um hvussu henda herferð fór at enda. Við síni sterku og kompromisleysu støðu í eitt nú spurningum um innlendis vápnalóggávuna og í etiskum spurningum fekk hann nógvar fíggindar á uttasta amerikanska høgravonginum.

Hóast sterk vinstravend sjónarmið, sum í USA vanliga verða nevnd liberal sjónarmið, var Edward Kennedy oftast tann, sum megnaði at sameina tey mongu ymisku sjónarmiðini í Senatinum. Hann fekk eina heilt serstaka støðu í amerikanska lóggávutinginum og hevði meira enn nakar annar einstakur senatorur ómetaliga stóra ávirkan á lóggávuna. Hetta megnaði hann, hóast hann í nógvum og stórum málum var langt frá teimum sterku konservativu kreftunum í amerikanska lóggávutinginum. Hann átti framúrskarandi gávur at finna semjur og at vinna sjálvt teir mest konservativu senatorar fyri eini góðari søk. Hann gjørdist soleiðis sjálv ímyndin uppá tað góða stríðið, og tað var tí sjálvsagt, at hann av fullum huga stuðlaði Obama frá fyrsta degi. Obama umboðaði tað Amerika, sum Kennedy so fegin vildi lata teimum uppvaksandi ættarliðum - eitt USA, har øllu høvdu somu rættindi og somu møguleikar uttan mun til mentan, búskaparlig kor, lit, kyn, trúgv ella etniskan uppruna annars.

Uttanríkispolitiskt hevði hann mangan eina serstøðu, sum var fjart frá tí, sum meirilutin stóð fyri. Hann gjørdist tíðliga harður mótstøðumaður av apartheid í Suðurafrika og stríddist fyri at fáa USA at gerast meira virkið í stríðnum móti hesi óræum samfelagsskipan. Hann fanst harðliga at uttanríkispolitisku kósini hjá Georg W. Bush, sum hann metti skaðiliga og sum fór at elva til, at USA fór at gerast alt meira isolerað. Edward Kennedy fekk rætt í sínum uttanríkispolitisku metingum og situr Obama nú við upptakinum eftir Bush í einum heimi, har USA hevur størri uttanríkispolitiskar trupulleikar enn nakantíð áður í søgu landsins.

Við deyða Edward Kennedys er komið stórt lið á demokratiska garðin í amerikanskum politikki. Hann hevði størri jaliga ávirkan á politikkin enn nakar annar einstaklingur og hann verður djúpt saknaður av øllum teimum, sum ynskja, at USA skal gerast til eitt vælferðarsamfelag og annars ætaka sær alheimsleiklutin sum verji fyri umhvørvi, mannarættindum og fólkaræði.

**Sosialurin**

## Viðv. broyting av kunngerð um hjálparráð í § 18 í forsorgarlógini

**Almannamálaráðið ætlar**

**at taka egingjald upp á 500 kr. fyri hjálpartól**

Almannamálaráðið boðar í skrivi frá, at ætlanin er at taka 500 kr. í egingjaldi fyri hvørt einstakt hjálpartól. Í uppskotinum hjá Almannamálaráðnum verður onki verður nevnt um, hvør grundgevingin er fyri at krevja 500 kr. í egingjaldi fyri hvørt hjálpartól.

Fólk, ið verða rakt av álvarsamari sjúku, hava aloftast brúk fyri nógvum ymiskum hjálpartólum at lætta um í gerandisdegnum. Hjálpartól, ið somuleiðis kunnu lætta um hjá møguligum avvarandi, ið skulu vera um tann sjúkurakta.

Fólk, ið verða rakt av álvarsomum sjúkum, so sum fólk, ið fáa heilatøpp ella heilabløðing, sklerosu, liðagikt, Parkinsonsjúku og ymsar aðrar líknandi sjúkur, hava aloftast brúk fyri fleiri ymiskum hjálpartólum, tað veri seg gangistavi, gangitóli/gangistativi, serstøkum hondtøkum, grípitong, wc-hækkara, song, ið kann hækkast og lækkast, serstaka madrassu, koyristól og møgulig onnur hjálpitól.

Verður egingjald upp á 500 kr. ásett fyri hvørt hjálpartól, kann tað koma at kosta teimum, ið verða rakt av álvarsamari sjúku, fleiri túsund krónur at útvega vanlig og neyðug hjálpartól. Tað er tískil ikki rímuligt ella rætt at áseta egingjald uppá 500 kr. fyri hvørt hjálpartól.

*Landsfelag Pensjónista mælir frá, at áseta egingjald upp á 500 kr. fyri hvørt hjálpartól. Hjálpartól til sjúkurakt eiga framhaldandi at verða veitt sum ókeypis lán.*

**Almannamálaráðið ætlar at strika stuðulin til fótarøkt hjá diabetikarum**

Almannamálaráðið boðar somuleiðis í skrivi frá, at ráðið er í ferð við at endurskoða forsorgarlógina og herundir endurskoða skipanina í § 18 í forsorgarlógini við hjálparráðum. Í hesum sambandi verður sagt frá, at Almannamálaráðið ætlar at taka av tilskotið til fótarøkt hjá diabetikarum. Almannamála-ráðið sigur, at grundgevingin fyri hesi broyting er, at hjálparráð ikki longur skal fevna um viðgerðir. Hetta uttan samstundis at vísa á, hvør myndugleiki/hvat ráð framyvir skal yvirtaka uppgávuna at veita stuðul til fótarøkt hjá diabetikarum.

Tað er sera óheppið at Almannamálaráðið við einum pennastroki ætlar at taka av stuðulin til fótarøkt hjá diabetikarum, hetta uttan samstundis at vísa á, hvør myndugleiki ella hvat ráð skal yvirtaka hesa uppgávu í framtíðini. Líkt er til, at Almannamálaráðið við hesi broyting av § 18 um hjálparráð í forsorgarlógini ætlar at flyta hesa sjúkuviðgerðar-útreiðslu yvir á brúkaran.

Fótarøkt hjá diabetikarum er neyðug fyribyrgjandi viðgerð, sum tað almenna/Almannastovan framhaldandi eigur at gjalda. Diabetikarar eru í stórum vanda fyri at fáa sár á tær og føtur, um teir ikki regluliga fáa eftirlit og viðgerð hjá autoriseraðum fótterapeuti.

Tey ið fáa diabetis, eru aloftast komin upp í árini. Diabetisjúkan ger, at føturnar gerast sárviðkvæmar, og hava fólk við diabetes tí brúk fyri regluligari fótarøkt/-viðgerð hjá autoriseraðum fótterapeuti. - Fótarøkt, ið kann verða við til at fyribyrgja at diabetikarin fær sár á tær ella føtur, sum síðan kunnu elva til amputatiónir og avlamni.

Almannamálaráðið eigur at geva gætur, at fólk, ið nærum einans hava fólkapensjón at liva av, og onnur við lágari inntøku, hava ikki ráð at gjalda slíka fótviðgerð sjálvi og eigur slík alneyðug fótviðgerð tí framhaldandi at verða goldin av Almannastovuni.

Í hesum sambandi skal vera mint á, at Almannamálaráðið seinastu mánaðarnar longu frammanundan hevur framt tvey sosialpolitisk inntriv í livikorunum hjá landsins diabetikarum:

Egingjaldið til diabetesheilivág varð hækkað við 800 kr. um árið pr. 1. juli 2009 og stuðulin til diabeteskost varð skerdur við 220 kr.um mánaðin úr 393 kr. niður í 173 kr. um mánaðin á vári 2009.

Fólkapensjónistar og onnur láglønt, sum longu frammanundan hava fingið øktar útreiðslur til sunnan diabetesmat og øktar eginútreiðslur til diabetesheilivág, hava ikki ráð sjálvi at bera kostnaðin av alneyðugari fyribyrgjandi sjúkraviðgerð/fótarøkt.

Verður stuðulin til fótarøkt til diabetikarar tikin av, er stórur vandi fyri at diabetikarar - av fíggjarligum ávum - ikki fara at fáa neyðuga fótviðgerð og at alt fleiri diabetikarar fara at fáa invaliderandi sár á tær og føtur við eftirfylgjandi amputatiónum.

Landsfelag Pensjónista mælir tískil staðiliga til, at skipanin um hjálparráð í § 18 í forsorgar-lógini framhaldandi skal fevna um fótarøkt hjá diabetikarum.

***Landsfelag Pensjónista***

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**

Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**

Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.